# Fylgiskjal til krabbagogguna



**<u>Spurningur 1</u>**

Børn hava rætt til at hava tað gott?
Hetta passar

Barnarættindasáttmálin sigur í grein 6, at tú hevur rætt at liva – og tað landið, sum tú býrt í, skal hjálpa tær við at hava eitt gott lív

**At tosa um:**

- Hvat heldur tú vera eitt gott lív?

**<u>Spurningur 2</u>**

Børn hava rætt til góðgæti fríggjakvøld?
Hetta passar ikki

*Men Barnarættindasáttmálin sigur í grein 27, at øll børn skulu fáa mat, hita, tryggleika, lærdóm og kærleika, so tú kanst menna teg.*

**At tosa um**:

- Hvat heldur tú vera góðan mat?
- Nær kennir tú teg tryggan og elskaðan?



**Spurningur 3**

Børn hava rætt til ókeypis skúlagongd?
Hetta passar

*Barnarættindasáttmálin sigur í grein 28, at tú hevur rætt til ókeypis skúlagongd, og at skúlin skal fara væl við tær.*

**At tosa um**:
- Hví man skúlagongd skula vera ókeypis?
- Kennir tú nakran, sum ikki gongur í skúla?



**Spurningur 4**

Tað er loyvt at sláa børn?
Hetta passar ikki

*Barnarættindasáttmálin sigur í grein 19, at myndugleikarnir skulu verja teg móti harðskapi, happing ella aðrari ringari viðferð.*

**At tosa um**:
- Hvønn kann man siga tað við, um man verður happaður ella sligin?



**<u>Spurningur 5</u>**

Børn hava rætt til at vita hvat hendir?
Hetta passar

*Grein 13 í barnarættindasáttmálanum sigur, at tú hevur rætt til at leita eftir, fáa og lata upplýsingar og vitan frá tær.*

*Grein 17 í Barnarættindasáttmálanum sigur eisini, at tú hevur rætt til at vita, hvat hendir í verðini – t.e. at hava atgongd til internet, sjónvarp, útvarp, bløð og bøkur.*

**At tosa um**:
- Sært tú nakra tíðindasending?
- Hvussu fært tú at vita hvat hendir í Føroyum?

**<u>Spurningur 6</u>**

Børn mugu ikki arbeiða?
Hetta passar ikki

*Børn kunnu arbeiða, men barnarættindasáttmálin sigur í grein 32 at tú skalt verjast fyri hørðum og vandamiklum arbeiði, sum kann skaða tína heilsu og skúlagongd. Føroyar skulu hava lóggávu, sum sigur, hvussu gamal tú mást vera, áðrenn tú kanst arbeiða.*

**At tosa um**:
- Hvussu nógv ár skal man vera fyri at sleppa at arbeiða í Føroyum
- Hvønn kann man biðja um hjálp, um børn verða sett til vandamikið arbeiði





**Spurningur 7**

Børn sum bera brek, hava ikki somu rættindi?
Hetta passar ikki

*Barnarættindasáttmálin sigur í grein 23, at tú hevur rætt til at fáa hjálp og menna teg og fáa eitt gott lív, um tú bert brek.*

**At tosa um**:

- Hvat er tað at bera brek?
- Kunnu børn í koyristóli sleppa við til øll ting í tykkara skúla?

**Spurningur 8**

Vaksin skulu spyrja børn hvat tey halda?
Hetta passar

*Barnarættindasáttmálin sigur í grein 12, at tú hevur rætt til at hava tína egnu meining, og tey vaksnu skulu virða hana. Dentur skal leggjast á títt sjónarmið í samsvari við aldurin á tær, og hvussu búgvin tú er.*

**At tosa um**:

- Hvat hevði tú ynskt at tey vaksnu spurdu teg um?
- Hvat heldur tú, at børn ikki skulu spyrjast um?

